# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Vit mugu gevast við at leggja okkum út í viðurskiftini hjá hvør øðrum og heldur samstarva í stríðnum ímóti yvurgangi*

*(russiski sendiharrin í Noregi)*

## Nú er hann klárt á odda



*Barrack Obama hevur lagt seg klárt á odda í valstríðnum (Savnsmynd)*

**Eftir teimum nýggjastu meiningakanningunum er Barrack Obama langt framman fyri John McCain í forsetavalstríðnum**

Barack Obama hevur tryggjað sær eina sera góða støðu nú bara fáar vikur undan forsetavalinum í USA. Sambært teirri nýggjastu meiningakanningini, sum CNN og The New York Times hava latið gera, hevði Obama fingið 53 prosent av atkvøðunum, var forsetavalið í dag. McCain hevði fingið 39 prosent. Samanborið við eina tilsvarandi kanning fyri einari viku síðani er munurin vaksin trý prosentstig.

Ein onnur kanning, sum Los Angeles Times og Bloomberg almannakunngjørdu í gjár, gav Obama 50 prosent og McCain 41.

Veddingarfelagið Intrade sigur, at Barrack Obama fer at vinna í teimum statunum, sum John Kerry vann í í 2004. Harafturat fer hann at vinna í Virginia, Ohio, Florida, Colorado, Nevada, Iowa, New Mexico og í Missouri, sigur Intrade. Niðurstøðan hjá felagnum er, at tað er 78 prosent sannlíki fyri, at Obama vinnur forsetavalið. Vinnaramøguleikin hjá McCain er 22 prosent.

Intrade hevði eisini eina forsøgn um, hvussu valið í 2004 fór at ganga, og úrslitið bleiv, júst sum felagið hevði sagt - í hvørjum einasta stati, skrivar The New York Times.

## Hinduar jagstra og myrða kristin í India

**Í India eru umleið 50.000 kristin ikin frá húsi og heimi og halda nú til í kirkjum og flóttafólkalegum**

Sambært myndugleikunum hevur stríð millum hinduar og kristin í India kravt minst 59 mannalív ella offurlomb, sum teir kristnu kirkjuleiðararnir rópa tey deyðu.

Umleið 2,5 prosent av indiska fólkinum, sum telur 1,1 milliard, eru kristin, og umleið 80 prosent eru hinduar. Teir kristnu leiðararnir vilja vera við, at ágangurin og drápini eru ein roynd at útvega sær fyrimunir á valinum, sum standur fyri durum.

AP-tíðindastovan skrivar, at stríðið hevur verið serliga ógvusligt í landspartinum Orissa, og myndugleikarnir har siga, at 34 fólk hava latið lív, síðani ein hindu-leiðari har bleiv myrdur tann 23. august. Drápið elvdi til øsing, og illir hinduar oyðiløgdu fleiri kirkjur of róku fleiri túsund kristin frá húsi og heimi. Indisku myndugleikarnir royndu at forða áganginum við at siga, at tað vóru ikki kristin, men maoistar, sum høvdu beint fyri hindu-leiðaranum.

Viðurskiftini millum tey kristnu og hindu-meirilutan í Orissa hava verið spent leingi og hevur sín uppruna í, at sambært hinduum hava kristnir trúboðarar noytt fleiri hinduar at taka við kristnari trúgv. Tað avsanna teir kristnu leiðararnir. Teir vilja vera við, at hindu-leiðararnir royna at elva til átrúnaðarliga øsing upp undir valið, sum verður næsta ár.

- Tann einasta grundgevingin er, at teir vilja útvega sær fyrimunir til valið, og vit eru offur í hesum stríði, sigur John Dayal, aðalskrivari í kristna kirkjuráðnum í India, við AP.




*David Irvvng fer til Noregs (Mynd: NRK)*

## Kanadiska stjórnin afturvald

**Stephen Harper heldur fram sum kanadiskur forsætisráðharri aftan á tjóðartingsvalið í gjár.**

**Tann konservativi flokkurin hjá Stephen Harper fekk 143 tinglimir á valinum í gjár. Tað eru 16 fleiri enn undan valinum, men kortini ikki nóg mikið til at útvega flokkinum meiriluta. Til tess krevjast minst 155 tinglimir.**

**Avbjóðarin til forsætisráðharraembætið, Stephane Dion, hevði eitt vánaligt val. Flokkurin fekk 77 umboð á ting og misti sostatt 18 tinglimir. Tann nýggi demokratiski flokkurin hevði harafturímóti framgongd.**

STUTT SAGT

## Forsetin útsett ferð

Íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, hevur í samráð við stjórnina í Reykjavík gjørt av at útseta eina ferð til Týsklands. Talan er um eina almenna vitjan, sum upprunaliga skuldi verða seinni í hesum mánaðinum, men orsakað av umstøðunum í Íslandi verður vitjanin útsett fyribils. Týski forsetin, Horst Köhler, fekk boð um útsetingina í gjár, skrivar Morgunblaðið. Ólafur Ragnar Grímsson hevði trupulleikar við heilsuni herfyri, tá hann bleiv lagdur inn á sjúkrahús við hjartatrupulleikum.

## Norðmenn keglast um Irving

Bretski rithøvundurin David Irving, sum er kendur fyri sínar umstríddu bøkur um seinna heimsbardaga, hevur elvt til øsing í Noregi. Irving var boðin á eina bókmentahátíð, sum verður í Lillehammer næsta ár, men aftan á fleiri mótmæli tóku fyrireikararnir innbjóðingina aftur.

Trupulleikin er bara, at nú sigur David Irwvng, at hann fer til Noregs, sama um hann verður boðin ella ikki. Í einum teldubrævi til eitt norskt blað skrivar hann, at hann hevur gjørt av at fara til Lillehammer, men at ferðin má haldast loynilig, tí hon kann hótta trygdina, skrivar hann. Hann skrivar eisini, at hann ætlar at leiga eitt rúm og at halda fyrilestur har.

David Irving hevur skrivað fleiri bøkur, har hann roynir at avsanna jødatýningina hjá nazistunum undir seinna heimsbardaga. Millum annað hevur hann skrivað, at eingir gassklivar vóru í Auschwitz. Fyri nøkrum árum síðani varð hann dømdur trý ára fongsul í Eysturríki fyri at hava avnoktað jødatýningina.